

# HUXA tiltak fyri ung

”Vilt tú vera ungur politikkari? Hevur tú hugsanir at deila við onnur? Ert tú í iva um, hvønn flokk tú hellir til? Hevur tú hug at vita meiri um, hvussu tú kemur úr skápinum sum ungur politikkari?” Soleiðis skrivar politiska ungmannafelagið HUXA á síni heimasíðu. HUXA skipar nevniliga fyri einum hugnaligum og læruríkum tiltaki leygardagin, og tey siga, at tiltakið er júst ætlað tær, sum tey taka til. – júst fyri tær. Útyvir, at tú fært eina lætt skiljandi gjøgnumgongd av konservatismu og borgarligum politikki í Føroyum, at tú kemur at kenna munin á konservatismu og liberalismu og fáa upplegg um kapitalismu og sosialismu, kemur eisini ein journalistur at greiða frá og geva góð ráð um, hvussu tú fært tín boðskap út í fjølmiðlarnar á bestan hátt. Tiltakið hjá HUXA verður leygardagin 20. mars klokkan 15.00 í kantinuni í Føroya Studentaskúla og HF-skeiði og endar við mati og víni klokkan 19. Tiltakið kostar 50 krónur, men limir í HUXA sleppa ókeypis við. Tilmelding fer fram við at ringja til Eyð á 581189 ella við at senda eina teldupost á eyd.hammer@huxa.fo

*Tey plagdu at kasta okkurt niður í gólvið fyri at vita, um eg eg bleiv kløkkur av larminum*

fyrsta sinni trein inn um skúlans gátt.

- Tá eg kom í 1. flokk, royndu tey at læra meg at tosa við røddini, men eg uppfangaði als ikki røddirnar. So har var í roynd og veru einki at gera. Nei, tað riggaði ikki, staðfestir Høgni.

Tá Høgni hevði gingið nøkur ár í vanligum skúla, flutti hann til Havnar. Her gjørdist hann næmingur á Venjingarskúlanum og bleiv eisini partur av deyvaflokkinum sum hoyrdi til skúlan á Trøðni, har hann og onnur deyv kundu fáa serundirvísing í teknmáli.

Hetta var ikki ein nýggj støða hjá Høgna, tí hann hevði havt samband við skúlan á Trøðni tvær ferðir um vikuna heilt síðani hann gekk í barnagarði.

- Har mentist eg rættiliga nógv. Her var eg saman við øðrum deyvum, og her varð eisini teknmál okkara ment nógv meiri, tí tað gekk skjótari fyri seg.

Nakað seinni fór Høgni á ein eftirskúla fyri deyv í Danmark, har hann mentist uppaftur meiri saman við øllum hinum deyvu, sum vóru har.

- Tað er fantastiskt at kunna samskifta við onnur, sum tosa sama mál og sum skilja tað sum eg sigi. Tað vísir seg, at samtalan bara gongur, og at ein her heilt spontant fær úttrykt júst tað sum ein vil.

Eitt dømi um, hvussu ymisk deyvamál og tungumál eru, er setningurin “Maðurin stendur á brúnni, sum gongur tvørtur um ánna”.

Fyri at ein deyvur skal skilja henda setningin til fulnar, má tulkurin fyrst greiða frá, at ein brúgv er har, og síðani siga frá, at maðurin altso stendur á brúnni. Annars heldur tann deyvi bara, at maðurin dettur niður í ánna, tí har er eingin brúgv.

## Meistarin lærdi seg teknmál

Eftir at vera afturkomin av eftirskúlanum í Danmark, var spurningurin, hvat Høgni so skuldi takast við.

- Eg hevði onga útbúgving, og byrjaði tí at arbeiða sum landari á Toftum. Men tja, eg veit ikki, hetta var ikki ordiliga tilfredstillandi, sigur Høgni sum arbeiddi her í níggju mánaðir.

*Eg eri heldur ikki keddur av støðuni, men eg kann ofta verða irriteraður, tí eg ikki fái sagt tað sum eg ætlaði við hini*

Her mátti onnur leið veljast, og fór Høgni nú undir at taka koyrikort til lastbil. Kanska kundi hetta gerast lívsstarv hansara? Men gakk, hetta bar ikki til.

- Eg fekk einki arbeiði sum lastbilførari, tí hetta arbeiðið jú er tengt at tí, at ein skal kunna tosa í telefon og annars at kunna samskifta við kundarnar.

- Eg royndi at fáa arbeiði, men tá varð sagt, at eg mátti hava nakrar arbeiðsroyndir at vísa á. Men altso, hvussu kundi eg fáa royndir, tá eg ikki fekk nakað arbeiði?!

Høgni var kortini heppin. Hann kom í samband við Jákup Joensen, sum hevði eitt snikkaravirki á Rituvíkarhálsi.

- Ja, meistarin góðtók meg beinanvegin. Og hann var enntá so framsíggin, at hann fór sjálvur á skeið at læra teknmál, sigur Høgni, sum verður útlærdur sum snikkari í oktober mánað í ár.

Enn hevur Høgni ikki avgjørt, hvat hann fer at gera, tá lærutíðin er lokin. Hann hevur góðan hug at halda fram sum snikkari, men kundi kanska einaferð seinni hugsað sær at flutt til Danmark.

- Har búgva nógv av vinfólkum mínum.

## Dagsskráin mánadagin 1. mars 2010

**7:00** Vekkarin ringir, ella rættari sagt: Hann vibrerar so mikið, at Høgni vaknar av tí. Smurdi matpakka og gjørdi seg kláran at fara til dagin. Hann setti damuna av við bussin til Havnar, og fór síðani til arbeiðspláss sítt á Rituvíkarhálsi

**8:00** Arbeiðsdagurin byrjar. Hann tosar fyrst eitt sindur við starvsfelagar sínar. Arbeiðsformaðurin hevur eitt arbeiði, sum hann ynskir at Høgni skal byrja uppá í dag

**8:10** Høgni koyrir headsettið um oyruni, fyri at hann ikki skal fáa tinnitus. Hann byrjar at líma eina trappu saman. Klokkan gongur skjótt, tá hann er í sving, og áðrenn hann veit av er kaffi á skránni

**9:30** Kaffisteðgur. Hann og hinir starvsfelagarnir tosa saman.

**10:00** Høgni fer undir aftur trappuna

**12:30** Matsteðgur. Vinarlagið er gott teirra millum. Høgni fær ikki altíð alt við, tá hinir tosa ov títt saman. Einur teirra gevur honum ein lítlan samandrátt um dagsins evni, sum er kapproður og kajakrógving

**13:00** Aftur til arbeiðis við sama góða hugi

**16:00** Arbeiðsdagurin endar. Høgni fer til hús. Slappaði av, hugdi eftir sjónvarpi og annað

**18:00** Át døgurða

**19:00** Setti seg við telduna at skriva formansfrágreiðing sína til aðalfundin hjá Deyvafelagnum, sum verður í morgin, leygardagin

**23:00** Til songar

# Keypa bensin uttan orð

Eitt dømi um, at tað ber til at samskifta við onnur, sum ikki duga teknmál, var ein dagin ið Høgni skuldi keypa bensin á eini bensinstøð.

Hann fylti bensin á og fór til diskin fyri at gjalda. Har stóð handilskvinna, sum Høgni ikki hevði sæð áður. Trupulleikin var, at hann fekk jú ikki sagt við orðum, hvørji ørindi hansara vóru.

- Eg brúkti ikki munnin, men vísti bara við varrunum á orðið “bensin”. Eg fekk somuleiðis sagt henni úr hvørjum tanga eg hevði fingið bensinið.

- Tað sjáldsama var, at hon skilti faktiskt hvat eg segði. Hetta vísir mær, at um fólk veruliga vilja skilja okkum deyvu, so letur tað seg væl gera, hóast vit so at siga tosa tvey ymisk mál.

# Ljóðleyst sjónvarp

Ein av týdningarmiklu eginleikunum hjá menniskjum er at kunna samskifta við onnur. Hetta ger seg ikki minst galdandi, tá deyvamálið og tungumálið hittast.

Høgna dámar væl at hyggja í sjónvarp eftir tíðindum - altso feskum tíðindum. Serliga væl dámar honum, tá føroysk tíðindi eru á skránni.

Hinvegin, - skal hann bæði síggja og “hoyra” føroysku tíðindini hjá Kringvarpinum, má hann bíða eitt heilt samdøgur, inntil tey verða tulkað í sjónvarpinum.

- Hóast mær dámar væl tíðindi, so er tað hvørki serliga stuttligt ella áhugavert at hyggja eftir tíðindum sum eru daggomul. Er tað okkurt í tíðindunum sum tykist vera áhugavert, so biði eg ofta tey, sum eg siti saman við, um at siga mær, hvat tað snýr seg um.

- Um sendingarnar ikki hava tekst undir, fái eg ikki nakað sum helst burturúr. Soleiðis er tað bara, sigur Høgni Højgaard.




SKRIVSTOVUFÓLK / LÆRLINGUR

Vit sóknast eftir skrivstovufólki ella lærlingi til skrivstovu okkara í Vatnsoyrum

Vit bjóða:
- eitt spennandi starv
- tryggar arbeiðsumstøður
- gott arbeiðsumhvørvi

Umsókn:
- umsókn saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skal vera okkum í hendi innan 31. mars

Løn:
- løn sambært avtalu

Vit vænta av tær:
- at tú vísir ágrýtni og nærlagni
- at tú kanst arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevni
- at tú ert fyrikomandi og álítandi

Meira fæst at vita við at venda sær til Jóhan á 33 21 77, 22 11 20 ella á post@hdygd.fo

HDYGD

í Geilini 2 | FO-385 Vatnsoyrar | Tel.: +298 332177 | www.hdygd.fo | post@hdygd.fo

*HDYGD er størsti vindeyga- og hurðaframleiðari í Føroyum og leggur altíð dent á at veita bestu dygd og tænastu. Í løtuni starvast 31 fólk hjá HDYGD.*

SENDISTOVAN